

# HALLÓ



*Eirikur Lindenskov, ábyrgdarblaðstjóri á Sosialinum, sum í dag broytir snið og útgávudagar.*

## Fer tú nú at sova leingi týsdag og hósdag?

– Nei tað fari eg ikki. Hóast Sosialurin ikki kemur á gøtuna týsdag og hósdag, so verða hesir dagar ikki so nógv øðrvísi í Miðlahúsinum fyri tað, hóast eingin deadline er til blaðið. Vit hava redaktiónsfundir, nógvar greinar at skriva og so skulu vit eisini røkja tíðindini á Portalinum og á Rás2.

**ER DIMMA NÚ EINASTA AVÍS Í FØROYUM?**
– Nei, tað er hon ikki. Vit hava fleiri aðrar ávísir í Føroym, eisini aðrar enn Sosialin og Dimmalætting.

**HVAT SKULU LESARARNIR HJÁ SOSIALINUM NÚ GERA TÝSDAGAR OG HÓSDAGAR?**
– Vit fara at gera mánadags- og mikudagsbløðini so áhugaverd, at bløðini skulu kunna lesast í tveir dagar.

**HVØRJA SØGU SKULU LESARARNIR AVGJØRT IKKI LOYPA UM Í BLAÐNUM Í DAG?**
– Eg haldi, at allar søgurnar í blaðnum í dag skulu og kunnu lesast. Men tað skerst ikki burt, at tá blaðið hevur so nógvan ítrótt, so eru tað nøkur, sum loypa ítróttin um.

**HVAT YNSKIR TÚ TÆR ALLAMEST BEINT NÚ?**
– At sólin skal skína sum páskadag!

# Long drink




Johan Dahl verður av parteigara lagdur undir at súgva kapital frá tí privata yvir í tað almenna

## Í MORGIN




Andøvsgul til strúk í vindi av útsynningi og suðuri, sum út á dagin slakar til gul, og um náttina hækkar hann í ein vestan. Skiftandi skýrák við ælaveðri, men eisini sólglottar hitin millum fimm og níggju stig.

## HÓSDAGIN




Lot til andøvsgul av vesturi og útnyrðingi, um náttina lækkar hann til sunnan og verður til eitt lot. Fyrrapartin einstøk æli, men annars turt veður og sólglottar. Hitin alt samdøgrið millum fimm og níggju stig.

## FRÍGGJADAGIN




Lot til gul av suðuri, út á dagin veksur hann vindin, sum út á kvøldið verður til gul til andøvsgul av útsynningi og suðuri. Mest skýggjað og um náttina eitt sindur av regni. Hitin millum fimm og níggju stig.

## LUFTTRÝSTIÐ









**Petur Skeel Jacobsen** greiðir frá um veðrið

### Hitalagið kring knøttin

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Nuuk | 1 | Tromsø | 0 | Moskva | 10 | Athen | 19 |
| Reykjavík | -1 | Bergen | 2 | Berlin | -- | Beijing | 15 |
| Tórshavn | 7 | Oslo | 1 | Paris | 13 | New Dehli | 33 |
| Lerwick | 4 | Stokkhólm | 5 | Madrid | 10 | Bangkok | 35 |
| Aberdeen | 2 | Keypmannah. | 9 | Róm | 17 | Sydney | -- |
| London | 10 | Helsinki | 2 | Malorca | 18 | New York | 6 |

## VESTFALLSKYRRINDI

28. mars — Mánin næstur jørðini
6. apríl — Seinna kvarter
9. apríl — Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2010

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 31. mar | 08:14 | 20:40 | 07:14 | 19:40 | 07:29 | 19:55 | 10:14 | 22:40 | 11:14 | 23:40 | 06:29 | 18:55 | 05:29 | 17:55 | 08:29 | 20:55 | 09:29 | 21:55 | 07:59 | 20:25 | 09:14 | 21:40 |
| 1. apr | 09:06 | 21:32 | 08:06 | 20:32 | 08:21 | 20:47 | 11:06 | 23:32 | - | 12:06 | 07:21 | 19:47 | 06:21 | 18:47 | 09:21 | 21:47 | 10:21 | 22:47 | 08:51 | 21:17 | 10:06 | 22:32 |
| 2. apr | 09:58 | 22:25 | 08:58 | 21:25 | 09:13 | 21:40 | 11:58 | - | 00:32 | 12:58 | 08:13 | 20:40 | 07:13 | 19:40 | 10:13 | 22:40 | 11:13 | 23:40 | 09:43 | 22:10 | 10:58 | 23:25 |
| 3. apr | 10:52 | 23:18 | 09:52 | 22:18 | 10:07 | 22:33 | 00:25 | 12:52 | 01:25 | 13:52 | 09:07 | 21:33 | 08:07 | 20:33 | 11:07 | 23:33 | - | 12:07 | 10:37 | 23:03 | 11:52 | - |
| 4. apr | 11:45 | - | 10:45 | 23:11 | 11:00 | 23:26 | 01:18 | 13:45 | 02:18 | 14:45 | 10:00 | 22:26 | 09:00 | 21:26 | - | 12:00 | 00:33 | 13:00 | 11:30 | 23:56 | 00:18 | 12:45 |